# **Tryggar vørur** til tey smáu

**Handilin BabySam hevur vitan og royndir innan barnaútgerð. Úrvalið er fjølbroytt, og finnur kundin ikki tað hann leitar eftir, so hjálpa starvsfólkini fegin og vilja fegin fáa vøruna til vega**

**HANDIL**
**Dagfinn Olsen**
dagfinn@sosialurin.fo




Í handilsdeplinum Miðlon eru nógvir handlar undir somu lon, og ein teirra er BabySam, ið selur barnaútgerð.

BabySam húsast nú í Miðlon, men innan handilin flutti í Miðlon í februar 2007, kallaðist handilin Baby&Barnaútgerð.

BabySam er donsk keta, ið hevur meira enn 30 ár á baki, og leggur ketan seg eftir at vøran er trygg og lýkur øll krøv.

Leikurnar, ið BabySam hevur at bjóða, eru mennandi og EU góðkendar.

Um ein leitar sær í handilin BabySam, so er úrvalið til tey smáu sera stórt, t.d. bilstólar, vognar, sengur, pusliborð, vøggur og alt annað tilhoyr til eitt lítið barn.

## Trygd og dygd

BabySam er ein handil, har trygdin og dygdin er í hásæti, so foreldur kunnu kenna seg trygg, tá keypt verður til børnini.

Vognarnir í BabySam eru í øllum prísflokkum, og har finst ein vognur til eitthvørt ynski

Merkir, ið BabySam hevur, er t.d. innan vognar merkið Odder, ið er donsk framleiðsla ið byrjaði í 1925. Hettar er avgjørt besti vognur á marknaðinum. Tryggur, og í bestu góðsku. Hann er sera góður til okkara veðurlag.

Onnur merkir av vognum eru Brio, Simo, Teutonia, Basson og øll tey merkini, ið BabySam umboðar.

Tá umræður bilstólar, so hevur BabySam teir tryggastu, sum eru á marknaðinum; Rømer og Maxi Cosi.

BabySam selur nógvar sera góðar og mennandi leikur í merkinum Lamaze, Sassy, Tiny Love, Maki og nógv onnur góð merkir.



## Undirklæði til mammuna

BabySam hugsar ikki bara um at veita teim smáu kundunum tað besta av tí besta. Eisini mammur kunnu leita sær í BabySam at finna sær okkurt til sín sjálvs.

BabySam selur nevniliga eisini undirklæði av merkinum Anita til mammurnar og amme bh í øllum støddum eru at fáa.

- Vit hava tað sera góða tilboð í BabySam, at um ein keypur vogn frá okkum, geva vit 10% av øllum, ið keypt verður eitt ár framyvir, siga tey í BabySam.

Og handilin hevur eisini ein BabySam klubba, sum ger ymisk tiltøk fyri kundan.










